VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Fyrrapartin fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar, men seinnapartin gul til stívt andøvsgul av suðri og møguliga regn. Hitin millum 8 og 11 stig.



Veðrið hósdagin:
Lot til andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið møguliga regn. Hitin millum 6 og 9 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Gul til stívt andøvsgul av norði og landnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Lot til andøvsgul av norði og landnyrðingi, sunnudagin upp í stívt andøvsgul. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 8 og 12 stig.

John's Resturant latin aftur

Fyrrverandi matstovueigarin, John Arne Nilsestuen, sigur, at talið av vitjandi hevur verið minkandi allan vetur, og serliga síðan Runavíkar býráð avgjørdi ikki at geva Kenneth Rasmussen dansi-og skeinkiloyvi, kom rættiligur stígur í. - Tað virkaði, sum um fólk fóru í protest og vildu heldur ikki vitja okkum, tá ið avgerðin í býráðnum fyrilá

John's Resturant í Saltangará er latin aftur, og fyrrverandi matstovueigarin, John Arne Nilsestuen, hevur ongar ætlanir um at fara undir slíkt virksemi aftur fyribils. – Undirtøkan var alt ov lítil, sigur hann
Mynd: Vilmund Jacobsen

MATSTOVUR
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

John's Resturant, sum hevur rikið matstovuvirksemi í Saltangará seinasta hálvt fimta árið, er nú latið aftur.

John Arne Nilsestuen, sum rak resturatónina, snaraði lyklinum fyri seinastu ferð, 26. apríl.

Hann sigur, at talið av vitjandi hevur verið minkandi allan vetur, og serliga síðan Runavíkar býráð avgjørdi ikki at geva Kenneth Rasmussen dansi-og skeinkiloyvi, kom rættiligur stígur í.

– Tað virkaði, sum um fólk fóru í protest og vildu heldur ikki vitja okkum, tá ið avgerðin í býráðnum fyrilá.

John Arne vísir á, at fólk tosa um, at einki er í kommununi.

– Men ein trupulleiki er, at nógv heldur velja at fara til Havnar at fáa sær ein bita enn at seta seg niður her í økinum. Hví so er, dugi eg ikki at siga.

Fyrrverandi matstovueigarin er harmur um, at virksemið hjá honum skuldi halda uppat.

– Men her var sum frá leið alt ov lítið at gera.

John Arne vísir á, at heldur ikki fyri jól, tá ið fólk fóru út at eta frokost saman, var nakar áhugi fyri John's Resturant.

– Vit høvdu snøgt sagt einki at gera og fingu einki burtur úr jólafrokostunum.

John's Resturant hevði annars skeinkiloyvi, sum John Arne nú hevur latið frá sær, tí tað gekk út.

– Hevði eg søkt um framhald, hevði eg fingið loyvi til tess, men tað gjørdi eg ikki, tí undirtøkan fyri virkseminum í Saltangará var alt ov lítil.

Spurdur, um hann hevur ætlanir um at byrja onkra aðrastaðni, sigur John Arne:

– Tað er ilt at siga, men tað verður so ikki fyribils, sigur John Arne Nilsestuen at enda.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	9
Nuuk	8
Qaqortoq	6
Ammassalik	3
Saint John's	–
Halifax	–
Reykjavík	10
Seyðisfjørður	4
Tórshavn	8
Lerwick	9
Aberdeen	13
London	17
Tromsø	4
Bergen	15
Oslo	–
Stokkhólm	11
Keypmannah.	21
Helsinki	5
Moskva	17
Berlin	17
Warzawa	14
Kiev	18
Bukarest	17
Paris	13
Madrid	12
Róm	18
Malorca	19
Athen	23
Malta	19
Tunis	23
Beijing	22
New Dehli	39
Bangkok	33
Jakarta	32
Sydney	17
New York	21
Miami	26
Los Angeles	21
Meksikobýur	22
Panama	–
La Paz	13
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	22

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt hátrýst, 1030 hPa. við Azorurnar stendur mestsum í stað og ein hátrýstryggur til Íslands verður yvir Føroyum mikumorgunin. Eitt lágtrýst, 1002 hPa. í útsynning úr Hvarvinum fer móti Íslandi og dýpist.

Lágtrýstið vestan fyri Ísland fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósnáttina.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 10/05 kl. 06⁰⁰– 11/05 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,8°
Minsti hiti máldur í mai: ÷3,0° - Mesti hiti máldur í mai: 19,7°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,2 mm – mált frá 10/05 kl. 06⁰⁰–11/05 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mai: 29,2 mm

VESTFALLSKYRRINDI

6. mai: Mánin næstur jørðini
11. mai: Seinna kvarter
19. mai: Tendring
21. mai: Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2004

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
12. mai	02.28	15.07	01.28	14.07	01.43	14.22	04.28	17.07	05.28	18.07	00.43	13.22	—	12.22	02.43	15.22	03.43	16.22	02.13	14.52	03.28	16.07
13. mai	03.29	15.51	02.29	14.51	02.44	15.06	05.29	17.51	06.29	18.51	01.44	14.06	00.44	13.06	03.44	16.06	04.44	17.06	03.14	15.36	04.29	16.51
14. mai	04.12	16.34	03.12	15.34	03.27	15.49	06.12	18.34	07.12	19.34	02.27	14.49	01.27	13.49	04.27	16.49	05.27	17.49	03.57	16.19	05.12	17.34
15. mai	04.54	17.15	03.54	16.15	04.09	16.30	06.54	19.15	07.54	20.15	03.09	15.30	02.09	14.30	05.09	17.30	06.09	18.30	04.39	17.00	05.54	18.15

5 707265 100036 >